# Vágbingar vilja ikki standa aftanfyri hinar

**Góðar umstøður í startinum hava verið settar sera høgt í Vági, har tað kanska er eitt sindur torført hjá áskoðarunum at finna røttu myndina**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Vágbingar vilja ikki vera aftan fyri hinar, og tí man tað kennast hugaligt, nú teir aftur hava fingið ein vinnarabát í felagnum*

Kappróðrarhýrurin hevur verið góður í Vági í hesi vikuni. Smyrla dreingirnir, sum hava vunnið tvær tær seinastu kappingarnar, eru komnir suður aftur. Teir hava verið í Havnini og gingið í tekniska skúlanum, men í hesi vikuni hava teir aftur verið til arbeiðis, og so hava teir vant á Vágsfirði.

– Tá Vágbingur var upp á tað besta, plagdu bátar at stima saman við teimum, tá teir vandu. Hetta hava vit ikki sæð enn. Men bilar hava verið á kaiuni, og teir hava givið ljóð frá sær, tá kappróðrarbáturin er komin inn ímóti.

Tað er Heri Mortensen, formaður í Vágs Kappróðrarfelag, sum vit hava í telefonini. Sjálvandi eru hann og teir spentir uppá, hvussu tað fer at gangast Smyrli í dag. Men tá vit tosaðu við hann, vóru hann og hinir ábyrgdarmenninir fyri kappróðrinum í Vági upptiknir av at fyrireika.

– Tað er bara gott, at strembanin eftir at fáa umstøðurnar so góðar, sum tað á nakran hátt ber til, er vorðin stór kring alt landið. Hetta økir um krøvini á okkum. Vit seta okkum sjálvar undir trýst, og vit ætla at gera okkara ýtarsta. Umboðini hjá Róðrarsambandinum koma suður í kvøld at kanna umstøðurnar, og vit vóna, at alt verður, sum tað eigur at vera, segði Heri Mortensen fyrrapartin í gjár.

Tá vit spyrja, um teir hava styrkt um fyrireikingarnar sammett við undanfarnu árini, so nevnir Heri Mortensen eitt nú, at teir hava sett merki upp á báðum ørmum á fjørðinum, so tað ber til at fylgja við, hvussu langt tað er á mál, og teir hava gjørt ein nýggjan sigurspall, sum er so mikið stórur, at tað ber til hjá øllum vinnarunum at koma á pallin, tá Óli í Hjøllum, skúlastjóri í Vági, fer at handa steypini. Óli er ættaður av Toftum, og hann róði við 8–mannafarinum Toftabátinum, tá teir miðskeiðis í sjeyti árunum vóru væl við í kappingini.

Tey umleið fýra hundrað róðrarfólkini koma suður við Smyrli, sum verður á Vági um hálvgum tólv tíðina. Tá bátarnir eru fingnir upp á pláss verður borðreitt í Framtíðini fyri róðrarfólkunum og súkklarunum, sum eisini skulu kappast á jóansøku.

### Tryggur startur

Kappróðrarmálið í Vági er frá grótkastinum á vestara landinum og vestureftir ella inn eftir fjørðinum. Soleiðis hevur tað verið, síðani grótkastið kom fyri einum tíggju árum síðani. Starturin hevur borið orð fyri at rigga sera væl, og tað verður kanska uppaftur betri í ár.

– Alt valdast um veðrið. Tíbetur sigur hann so at siga stilli, so tað skuldi boðað frá góðum. Í ár hava vit ein stóran krana, sum verður á ytra endanum á grótkastinum. Hann røkkur einar níggju metrar út og skal halda ytra endanum á startinum. Í innara endanum fer ein gravkúgv at spenna startin. Harafturat verða endar knýttir úr grótkastinum og út til boyurnar, sum halda starttrossanum. Hetta skuldi havt við sær, at fasti starturin verður rættuliga fastur, sigur Heri Mortensen, sum vónar, at tað fer at ganga væl og skjótt við kappróðrinum í dag.

### Misvísandi

At teir í Vági hugsaðu so nógv um startin, tá teir máldu nýggja kappróðrarmálið upp, hevur við sær, at áskoðararnir hava eitt sindur ilt við at fylgja við, tá bátarnir koma inn ímóti málinum. Tá sær tað út sum, at sunnaru bátarnir eru fremri, enn teir í veruleikanum eru.

– Tað er rætt, at málið er ikki vinkulrætt á Diasa brúgv, sum vit kalla brúnna, har málið er. Grótkastið hevur við sær, at sunnaru bátarnir starta vestari, enn teir norðaru bátarnir gera. Tí er tað soleiðis, at t. d. 200 metra merkið á norðara landinum stendur yvirav 300 metra merkinum á sunnara landinum. Sjálvandi rógva allir bátarnir sama teinin, men tað hevur víst seg, at tað verður meiri lagt til merkis, at viðurskiftini eru soleiðis, tá bátarnir koma inn ímóti málinum, enn tað verður, tá teir starta. Manningarnar fyrireika seg væl, og ein partur av hesum eigur sjálvandi at vera at seta seg inn í, hvussu málið sær út, heldur Heri Mortensen.

*Hava tit ongantíð tosað um at flyta róðrarøkið?*

– Jú, tað hava vit gjørt. Men higartil hava vit fyrst og fremst hugsað um góðar umstøður í startinum og at rógva. Tær eru best undir grótkastinum. Hin møguleikin hevði verið at flutt startin longri norður. So hevði hann verið í innsiglingini – millum grótkastið og á Marknoyri. Tað hevði havt við sær, at endamálið hevði verið meiri yvir eitt, men tað hevði eisini havt við sær, at starturin kundi verið meiri viðbrekin yvirfyri vindi og streymi. Nú verður av álvara tosað um at útbyggja havnina í Vági. Teir siga, at tað fer framvegis at verða møguleiki fyri at rógva kapp her. Men um tað verður neyðugt at broyta vísningin av málinum, ella um vit annars fara at broyta málið, tað vita við ikki, sigur Heri Mortensen.

Tað verður roknað við, at útbyggingin av havnarlagnum í Vági verður liðug, tá jóansøka aftur verður í Vági um tvey ár.

## Dystir um vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| 1. deild menn | | |
| 30.06 | GÍ-EB/S | Suni Johansen |
| 30.06 | HB-TB | Eiler Rasmussen |
| 30.06 | NSÍ-KÍ | Niklas á Líðarenda |
| 30.06 | VB-B36 | Petur Skarðenni |
| 03.07 | Skála-B68 | Oddmar Andreasen |
| 2. deild menn | | |
| 29.06 | VB-B71 | Petur Hans Joensen |
| 29.06 | LÍF-B36 | Rúni Gaardbo |
| 29.06 | NSÍ-Sumba | Regin Egholm |
| 29.06 | FSV-ÍF | Petur Reinert |
| 29.06 | HB-KÍ | Johann Krogh |
| 3. deild menn | | |
| 30.06 | GÍ-AB | Edvard Højgaard |
| 30.06 | HB-TB | Georg Rasmussen |
| 30.06 | Royn-B68 | Eyðun Kjærbo |
| 30.06 | FSV-B71 | Jan E. Glyvradal |
| 30.06 | ÍF-B36 | Jan Gardar |
| 1. deild kvinnur | | |
| 30.06 | B36-KÍ | Pætur Clementsen |
| 30.06 | B68-HB | Óli Samuelsen |
| Inter-Toto | | |
| 29.06 | B68-St.Gallen | |



# HB skal reisa seg

**Bæði liðini hava skaðar og leikbann at dragast við undan dystinum**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*


*Miðvallarin, Rógvi Jacobsen, er leikbannaður í dystinum ímóti TB*

Eftir eyðmýkjandi tap á sundalagsstevnuni ímóti felagsliðnum EB/Streymi, skal oddaliði úr Havn aftur reisa seg. Sunnudagin kemur aldursforsetin av Tvøroyri á vitjan í Gundadal. Onki annað, enn ein sigur kann góðtakast av havnarliðnum. Undan dystinum má sigast, at HB er stórfavorittur, og skal oddasessurin varveitast, er kravið trý stig. Tvøramenn berjast fyri at sleppa undan niðurflyting, og vónirnar um stig sunnudagin eru ikki av teimum bestu.

### Rógvi leikbannaður

Klaksvíkingurin á HB-miðvøllinum fekk sítt triðja gula kort ímóti EB/Streymi seinasta vikuskiftið, og er tí leikbannaður ímóti TB. Rógvi hevur havt eitt gott kappingarár, og tað er tí smeitur fyri HB-liðið, at hann ikki er tøkur. Vandamikli framherjin, Uni Arge, er framvegis skaddur og onki røkist fyri, at hann verður klárur at spæla í bræði. Annars er Hallur Danielsen so smátt byrjaður at venja aftur, men hann er enn ikki heilt klárur og verður heldur ikki at síggja á vøllinum sunnudagin. HB-liðið hevur ikki staðið seg so væl uttanfyri Havnina í ár, so kravið er trý stig hvørja ferð í Gundadali.

### Mugu berjast

Hjá TB stendur ikki so væl við fólki, teir hava tvey leikbann og tveir mans, ið sita uttanfyri við skaða. Nebosjé og Andrass Nolsøe hava ikki vant hesa vikuna, og hvørgin teirra verður við sunnudagin. Nær teir verða klárir, er enn ikki greitt. Í dystinum á Sevmýri seinasta vikuskifið, fingu bæði Tórður Mortensen og Wladimir Matijivic gula kortið, og vera heldur ikki við í Gundadali.

Av Tvøroyri verður sagt, at tað gongur tann rætta vegin, og menn verða noyddir at berjast fyri søkini, um tað skal eyðnast at fáa nakað stig úr Gundadali. Eftir at Lynge Nielsen gjørdist venjari, hava venjingarnar verið góðar, og moralurin er góður undan dystinum ímóti HB. – Vit eru bara noyddir at vóna tað besta, tí tað hevur víst seg, at vit hava tað altíð sera torført Í Gundadali, verður sagt av Tvøroyri.

# GÍ ætlar sær í oddin

**Sterku miðvallarnir, Magni Jarnskor og Zdizislaw Janik, hava báðir leikbann, og vera tí ikki við í Sarpigerði sunnudagin**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Eftir eina heldur slaka byrjan uppá kappingarárið, er liðið úr Gøtu so spakuliga byrja at nærkast oddinum. Eftir sigurin á B36 seinasta vikuskiftið, eru nú bert fýra stig upp til oddaliðini. Vinnur GÍ sunnudagin, og oddaliðini snáva, so eru gøtumenn brádliga væl fyri í stríðnum um heiðursmerkir. Sunnudagin kemur felagsliðið EB/Streymur á vitjan, sum seinasta vikuskiftið óvænta vann á oddaliðnum HB.

### Magni og Janik ikki við

Úr Gøtu verður sagt, at liðið er væl fyri undan dystinum ímóti EB/Streymi sunnudagin. Allir, uttan langtíðarskaddi Krzystof Popczynski, hava vant hesa vikuna. Bæði Magni Jarnskor og Zdizslaw Janik fingu sítt triðja gula kort seinasta vikuskiftið í Havn, og eru tískil leikbannaðir til dystin. Johan Nielsen er tí noyddur at fremja nakrar broytingar á miðvøllinum frá dystinum seinasta vikuskiftið. Bartal Eliassen hevur havt ein skaða at drigist við, men hann er blivin so mikið frægur, at hann við vissu verður at síggja á vøllinum sunnudagin.

- Skal liðið gera seg galdandi í ár, er kravið trý stig sunnudagin, verður sagt úr Gøtu. Vónirnar eru eisni góðar í Gøtu, tí GÍ plagar at hava gott tak á felagsliðnum.


*Skulu gøtumenn aftur gera seg galdandi í toppinum í ár, skulu teir vinna á EB/Streymi sunnudagin*

### Nøgdir við javnleik

Sjálvt um tað bleiv til trý stig ímóti oddaliðnum HB á sundalagsstevnuni, so eru teir eru úr EB/Streymi lítilatnir, tá talan er um dystin í Gøtu. –Vit fara altíð inn á vøllin eftir trimum stigum, men fáa vit annað stigið í Gøtu sunnudagin, eru vit væl nøgdir, verður sagt úr EB/Streymi. Teir vísa á, at tað er altíð torført at spæla í Gøtu, haraftat tykist GÍ at vera væl fyri í løtuni, og tí eru vit væl nøgdir við javnleik.

Hjá EB/Streymi eru allir, uttan verjuleikarin Andrzej Pacek, tøkir. Pacek var heldur ikki við ímóti HB seinasta vikuskiftið, so tað verða ikki tær heilt stóru broytingar frá dystinum ímóti HB.

# B36 skal vinna á jóansøku

**Bæði liðini fara eftir sigrinum á jóansøku. Dysturin verður spældur leygardagin**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Skal B36 gera sær vón um, at endurtaka meistaraheitið frá í fjør, kann onki annað enn ein sigur góðtakast í stevnudystinum í Vági. Eftir, at B36 misnýtti møguleikan at koma heilt fram í oddin seinasta vikuskifti, vóna havnarmennirnir, at teir fáa trý stig norðuraftur við sær. Vágbingar hava góðar vónir undan jóansøkudystinum, og um nøkur vón skal gerast um heiðursmerkir, er kravið ein sigur.

### VB fer eftir trimum stigum

Vágbingar hava vant við fullari ferð hesa vikuna. Eftir venjaraskiftið eru nógvir mans til venjing og úr Vagi siga teir, at tað nú gongur framá. Eftir góða úrslitið í Klaksvík seinasta sunnudag, eru vónirnar góðar undan dystinum ímóti B36. VB plagar at hava gott tak á havnarliðnum á Eiðinum, og fara teir eisini eftir sigrinum hesaferð. VB-liðið hevur allar mans tøkar, uttan Bobo, ið fekk reyða kortið ímóti KÍ.


*Stevnudystur er í Vági, og bæði VB og B36 ætla sær øll trý stigini*

### B36 skert

B36 fer við skerdum liði á jóansøku. Jákup á Borg er leikbannaður eftir reyða kortið seinasta sunnudag, og Jens Kristian Hansen verður heldur ikki við. Jens Kristian meiddi seg so illa mitt í vikuni, at hann allarhelst ikki verður at síggja á vøllinum aftur, fyrr enn eftir summarsteðgin. Eisini rumenin, Din Sandu, er skaddur, og miðvallarin verður heldur ikki at síggja á B36-liðnum leygardagin. Umframt hesar er framherjin, Tórálvur Poulsen, rættiliga ivasamur undan dystinum. B36 hevur ikki staðið seg so væl í ár, og skal liðið gera seg galdandi í toppinum, skulu teir vinna.